

*F.v. Pauli Magnussen, Kári Sólstein, Elis Poulsen og Kári Olsen hava í vikuni verið á ferð á Danmarkar hvønn morgun.*
*Mynd: Heri á Rógvi*

# Góðan morgun, Danmark

**Tvær ferðir Kári, Elis og Pauli eru á ferð í Danmark við Góðan morgun Føroyum**

SENDING
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Við framkomnari GPS útgerð sum vegvísara stevndu teir fýra, teknikarin Pauli, kenda føroyska morgunrøddin Elis og tvær ferðir Kári – ávíkavíst Olsen og Sólstein – móti Århus týsdagin. Ørindini vóru næsta morgun at senda eyðkendu føroysku morgunsendingina Góðan morgun Føroyar beinleiðis úr Århus sum partur av einari rundferð í Danmark.

Undan Århus høvdu teir verið í Hirtshals og Ålborg. Esbjerg var á skránni hósmorgunin, og fríggjamorgunin varð vitjað í Odense.

### Prát og tónleikur

Leisturin hjá teimum fýra hendan mikumorgunin er einfaldur: Prát og tónleikur. Og har er ovmikið av fólki at práta við. Fólk standa mestsum í bíðirøð fyri at sleppa framat mikrofonunum. Prátað verður um leyst og fast, og, sum sagt verður í einum práti, verða teir mest kritisku spurningarnir goymdir til næstu sending. Prátað verður við føroyingar í Århus, sum á ein ella annan hátt hava nakað spennandi at siga frá. Alt frá klaksvíksprúti við fyrrverandi timburhandilsstjóra til prát um lestrarumstøður og arkitektur.

Teir tríggir hugnaligu vertirnir nýta sítt arbeiði ein mikumorgun í Danmark, og teknikarin fær alt at hanga saman. Og tað er ikki heilt frítt, at teir skjóta eitt sindur eftir hvørjum øðrum.

Tónleikurin er sum sagt væl umboðaður. Maria Guttesen, Petsi Tvørfoss og Høgni og Finnur spæla beinleiðis umvegis ISDN sambandið í Århus í føroyska Kringvarpinum.

### Hvad laver I?

Sendingin mikumorgunin fær eina heilt óvæntaða byrjan, tá Elis Poulsen brýtur seg leysan frá handritum, ið segði, at hann fyrst í sendingini skuldi koma gangandi inn í Áarstovu, sum er hølið hjá Føroyingafelagnum í Århus, og fólk fagna honum við lógvabrestum. Men heldur velur Elis at práta eina løtu við nakrar arbeiðsmenn uttan fyri Áarstovu, sum neyvan kenna kenda útvarpsverin, eiheldur Góðan morgun Føroyar.

Men tað er ikki nakað, sum órógvar hinar útsendu úr føroyska Kringvarpinum ella sjálva sendingina. So hvørt sum sendingin líður, verður stevið lættari, og prátini tykjast at ganga enn betri og betri. Og soleiðis gongur tíðin skjótt hendan heldur óvanliga morgun fyri føroyskar danir í Danmark.

Síðsta sendingin í røðini verður sum sagt send úr Odense fríggjamorgunin.



**Les Sosialin so ert tú við**

## KROSSORÐ

| 457 | FAR ! | EXETER | SANGUR | NITRO-GEN | GAMALT STAÐA-NAVN | DÍS | TVÍLJÓÐ | VERA HOL | PROFET-UR | DIRKA | AMAZON | KVINNA | | OYGGJ Í MEÐAL-HAVINUM | OXYGEN | SPILLIR BURTUR |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| FÓLKA-FUNDAR-STAÐUR | 1 | | | | | | | | | | | | KEMISK EIND / NATRIUM | | | |
| SPANIA | | REX / TELGDI | | TUPOLEV / "MÓTI" | | | PLÁTU-MERKI | | | 2 | KVINNA / MAÐURIN | | | | OXYGEN / URAN | |
| SJÚKA | | | | | | | Í NÓLSOY / REAUMUR | | | | | | | | | |
| TANGI Í HAVN | | | | | 3 | | | | | | | | TONS | | KALIUM / NEGATIVT SVAR | |
| | ANTONOV / AMPÈRE | | | GRAMM / BRØKUR | | BETA | FRONSK Á | EINS | AKU ---? / LAND | | | | HÓRA / VØKUR OYGGJ | | | |
| SKER | | | 4 | | | 5 | | | | KVINNA / NÝGGJAN | | | | LIVIR / FISK | | |
| | VINDUR | SKOTSKUR BÝUR | LIVIR / EDD | | | ANGRAR / EUROPA-VEGUR | | | | | | MAÐUR / LARGE | | | | Í NÓLSOY |
| TANGI VIÐ TANGUM | | | | | | | | SVENSK KONA | | | 6 | | | | SVØRÍKI / ÍTRÓTTA-STEVNA | |
| LIVIR | | | NEON / MAÐUR | | | SPANIA / PRIMA | | EINS / VIÐSKERI | 7 | | | BRESTUR | | | | |
| TVÆTLA | | | | | | | FOSFOR / 8 PINTS | | ABER-DEEN / FÍN | | FØROYSK BYGD | STÓRUR BÝUR | | | | |
| TYKUR | | | | AMPÈRE | OBS! | KELINAVN / ESKJA | | | | | | YTTRIUM / GL. REIÐARÍ | | SNEIS (STYTT.) | NORGE / BEITA | |
| SKOTSK-UR BÝUR | | | | | | 8 | | | | TEKNO-LOGI / A4-PAPPÍR | 9 | | AMBOÐ / URT | | | |
| IKKI JA | | | | Í NÓLSOY / RÚMDAR-STØÐ | | | | | | | | | | | | |
| LITUR | | NIELS JUUL | METUR / PÍNA | | SLEYGI / EINS | | | | | | | NITRO-GEN / HÓAST | | ÓKENDUR / MILLI-METUR | | |
| IKKI NAKAR | | | | | | NULL / URAN | | SPANIA | KELVIN / SVÁVUL | | MAÐUR / HYDRO-GEN | | 11 | | DONSK OYGGJ | HÁLV-TRÝSS |
| Í NÓLSOY | | | | | | | 10 | | | Í NÓLSOY | | | | | | |

## Vinnari:

*Fríðbjørg úr Fugloy*
*Heygavegur 31*
*700 Klaksvík*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: GONGULAGIÐ

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| G | A | M | L | I | E | N | D | I | | G | A | N | D | U | R |
| L | | O | Y | G | G | J | A | R | V | E | G | U | R | I | N |
| Y | | N | N | | I | A | | O | | V | G | | A | G | A |
| V | A | G | G | A | | R | U | N | A | | | A | K | | |
| U | R | D | U | | A | Ð | R | I | R | T | A | N | K | A | R |
| R | | I | R | A | | A | | | | | L | | | | Í |
| S | U | N | I | | A | R | G | J | A | K | O | N | A | | S |
| N | N | | N | E | R | V | Ø | S | I | T | E | T | U | R | |
| E | G | O | | L | | Ø | Ð | A | N | | V | | R | Ú | S |
| S | A | K | R | I | S | T | I | | O | B | E | R | O | N | |
| 456 | R | A | N | N | | T | R | Æ | | E | R | | R | A | K |
| K | N | | A | | S | U | | G | I | R | A | R | A | | I |
| U | | E | | S | P | R | E | I | Ð | A | | Ó | | G | K |
| N | A | I | N | | E | | | R | R | R | R | | A | L | A |
| O | G | N | | E | L | N | A | | A | | U | T | T | A | R |
| Y | N | D | I | S | L | I | G | | R | U | G | G | A | Ð | I |

### Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

**Loysunarorðið:** ............................................ **457**

Navn: .............................................................

Bústaður: .....................................................

Bygd/býur: .....................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*

☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

☐ **Villini súgdjór** – *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
☐ **Íslandsklokkan** – *Halldór Laxness*
☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***